UTTAN ÚR HEIMI

# Ætla at spreingja flogfar á havsins botni



*Tvey flogfør av slagnum Su-33 uppi yvir flogberanum "Admiral Kuznetsov". Hendan myndin er frá einari venjing í Barentshavinum fyrr í ár*

**Russar ætla at forða fyri, at onnur fáa hendur á teknisku útgerðini umborð á flogfarinum, sum sakk nærhendis Hetlandi fyrr í vikuni**

FLOGÓHAPP

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hernaðarflogfarið, sum var av slagnum Su-33, skuldi seta seg á dekkið á flogberanum "Admiral Kuznetsov" seinnapartin mánadagin, men flogskiparin fekk ikki steðgað flog-farinum, sum tí fór í havið. Tað eydnaðist flogskiparanum, Jurij Komejev, at skjóta seg úr flogfarinum, áðrenn tað fór út av dekkinum.

Russiska herflotaleiðslan sigur, at flogfarið liggur á 1100 metra dýpi í altjóða sjógvi nærhendis Hetlandi. Ein talsmaður hjá flotaleiðsluni segði fyrradagin, at Su-33 er eitt nútímans slag av jagaraflogførum, og at ætlanin at spreingja flogfarið, so onnur ikki skulu fáa fatur á teirri loyniligu tøkniligu útgerðini í tí.

"Admiral Kuznetsov" er við í einari russiskari flotavenjing, sum byrjaði tann 20. august, og sum varir ein mánað. Sambært norsku verjuni er hetta fyrstu ferð síðani kalda kríggið, at russiski herflotin hevur havt eina venjing so langt suðuri. NTB visti í gjár at siga, at tvey russisk herskip hava verið í Bergen í vikuni og tikið olju.

Men russiski herflotin er ikki tað, hann var. Russar vilja ikki siga, hvusu stórur flotin er, men sambært hernaðartíðarritinum Janés Intelligence Review hava russar 17 kjarnorkuriknar kavbátar við rakettum, 26 aðrar kjarnorkuriknar álopskavbátar, 17 stór herskip, 50 herskip í fregattstødd og umleið 70 smærri herskip.

Hóast flotin var væl størri í sovjettíðini, er tann russiski herflotin tann næststørsti í heiminum. Bara tann amerikanski er størri.

Óhappið við flogfarinum við Hetland er ikki tað fyrsta hjá russiska herflotanum. Fyri fimm árum síðani sakk kavbáturin "Kursk" undir venjing í Barentshavinum, og fyri tveimum árum síðani sakk ein annar kavbátur, "K-159". Vladimir Putin, forseti, hevur ofta funnist at flotaleiðsluni, og so seint sum í síðstu viku gav hann Vladimir Kurojedov, flotaovasta sekkin og setti Vladimir Masorin í hansara stað.

# Eingi kjarnorkuvápn í bræði

**Tað fara at ganga fleiri ár, áðrenn Iran verður ført fyri at útvega sær kjarnorkuvápn**

IRAN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Vesturheiminum nýtist ikki at stúra fyri, at Iran verður ført fyri at útvega sær kjarnorkuvápn tey fyrstu árini. Tað er niðurstøðan í einari nýggjari frágreiðing, sum ein viðurkendur granskingarstovnur í London hevur skrivað.

Stovnurin vil vera við, at iranar hava fleiri tekniskar trupulleikar at loysa, áðrenn teir kunnu taka nakað veruligt stig ímóti kjarnorkuvápnum, og at tað fer at taka fleiri ár at loysa hesar trupulleikarnar.

Í síðsta mánað gjørdi Iran av at taka sína kjarnorkuverkætlan uppaftur hóast hvøss mótmæli úr Evropa og USA. Eitt nú fóru iranar aftur undir at ríka uran, men ES og USA hava kravt, at teir skulu steðga hesum arbeiðinum í seinasta lagi tann 19. september. Gera teir ikki tað, fer trygdarráðið hjá ST at viðgera støðuna, og so kann væl henda, at tiltøk verða sett í verk ímóti landinum.

Nývaldi iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, segði fyri nøkrum døgum síðani, at hann hevur eina loysn við sær, tá hann seinni í mánaðinum fer á ST-toppfund í New York.

## Tímaløn: 9 krónur

Norska blaðið Nordlys hevur avdúkað, at polskir handverkarar arbeiða í Noregi fyri níggju norskar krónur um tíman.

Pólendingarnir eru í byggivinnuni í Tromsø, og verri er, at teir eru í ferð við at byggja tveir almennar bygningar, eitt ellisheim og ein framhaldsskúla. Nordlys hevur fingið fatur á sáttmálanum, sum pólendingarnir arbeiða eftir, og har stendur, at grundlønin er 4,50 polskar zloty, sum svarar til níggju norskar krónur.

Tað er eitt felag, sum hevur fingið teir polsku handverkararnar til Noregs. Felagið hevur síðani ein byggisáttmála við kommununa, og í honum stendur millum annað, at kommunan hevur tagnarskyldu, tá tað snýr seg um lønina og onnur arbeiðsviðurskifti hjá teimum útlendsku handverkarunum. Sambært Nordlys hava pólendingarnir sjálvir fingið at vita, at teir verða sendir heim, avdúka teir síni lønarviðurskifti.

Norsku fakfeløgini eru í øðini inn á mannagongdina, og tey harmast serliga um, at almennir byggiharrar eru við til at misbrúka útlendska arbeiðsmegi.

## Viðgongur dráp

Irakski forsetin, Jalal Talabani, segði í einari sjónvarpssamrøðu í gjár, at undanmaður hansaera, Saddam Hussein, hevur nú viðgingið, at hann gav boð um ymisk lógarbrot so sum dráp og avrættingar.

Talabani vildi ikki siga, hvørji dráp ella hvørjar avrættingar Saddam hevur viðgingið seg sekan í, men hann er í hvussu er ákærdur fyri at hava givið herinum boð um at myrða ein hóp av shiamuslimum í býnum Djubali í 1982. Verður hann dømdur sekur í hesari ákæruni, kann hann fáa deyðarevsing. Serdómstólurin, sum kannar skuldsetingar ímóti Saddam Hussein, skal eisini útgreina, hvat veruliga hendi, tá herurin drap fleiri túsund kurdar við eiturgassi í 1988, og tá ein shiamuslimskur uppreistur bleiv bardur niður í 1991.

Ætlanin er, at rættarmálið ímóti fyrrverandi irakska forsetanum skal byrja tann 18. oktober, men verjar hansara hava biðið um at fáa málið útsett, tí teir vilja hava betri stundir til at seta seg inn í skjølini, sum ákæruvaldið hevur funnið fram.

## Skyldmaður Arafats skotin

Ókendir menn skutu gjáranáttina fyrrverandi ovastan í palestinsku trygdartænastuni Moussa Arafat, sum var systkinabarn fyrrverandi palestinska forsetan Yasser Arafat.

Palestinska løgreglan segði í gjár, at fleiri menn lupu á húsini hjá fyrrverandi trygdarovastanum og skutu hann. Ein sonur hansara var eisini inni í húsunum, men í gjár var ógreitt, um álopsmenninir høvdu burturflutt hann, ella um hann var sloppin til rýmingar.

Moussa Arafat var trygdarovasti hjá teimum palestinsku myndugleikunum, til núverandi leiðarin, Mahmoud Abbas, koyrdi hann frá. Hann varð fleiri ferðir skuldsettur fyri svik, og løgreglan sigur, at hann hevði nógvar fíggindar. Moussa Arafat var 65 ára gamal, nú hann doyði.

## Einki er sum Kuba-sigarin

Hóast tað hevur regnað sera lítið í Kuba tey seinastu árini, megnar landið framvegis at útflyta einar 100 milliónir hondrullaðar sigarir um árið. .

Oscar Basulto, sum stendur fyri kubanska sigarútflutninginum, sigur við AP, at fjórðingurin av tí svarta tubbakkinum, sum verður brúkt til sigarir, kemur úr Kuba. Men áhaldandi turkur hevur gjørt, at sigarútflutningurin er minkaður, tí undan turkinum seldu kubanar einar 150 milliónir sigarir av landinum um árið.

Okkurt bendir tó á, at kubanar hava funnið upp á ráð, tí sambært Oscar Basulto hava bøndurnir tillagað eina nýggja tubbaksplantu, sum ikki krevur so nógv regn sum tann vanliga.